Fíggjarnevndin

Vágur 21. november 2011

**Reglugerð fyri hátíðarhald av starvsdøgum v.m. hjá Vágs kommunu**

**Endamál**
Endamálið er at heiðra starvsfólkum/borgarum á rundum starvs- og føðingardøgum.

**Ábyrgd**
Avvarðandi leiðari og starvsfólkið hava ábyrgdina, umframt lønarumsitingin hjá Vágs kommunu.

**Reglur**
Starvsfólk verða heiðrað soleiðis av leiðara/stjóra (Vágs kommunu):

**Starvsdagar**

| | |
|---|---|
| 10 ára starvsdag | blómutyssi og gávu fyri áleið 1.000,00 kr.. |
| 15 ára starvsdag | blómutyssi og gávu fyri áleið 1.500,00 kr.. |
| 20 ára starvsdag | blómutyssi og gávu fyri áleið 2.000,00 kr.. |
| 25 ára starvsdag | blómutyssi og gávu fyri áleið 5.000,00 kr.. |

Eftirfylgjandi rundar starvsdagar fær starvsfólkið blómutyssi og gávur.
30 ára starvsdag fyri áleið 3.000,00 kr..
35 ára starvsdag fyri áleið 3.500,00 kr..
40 ára starvsdag fyri áleið 4.000,00 kr.. o.s.v.

**Føðingardagar**
50 ára føðingardag blómutyssi fyri áleið 300,00 kr..
Eftirfylgjandi rundar føðingardagar senda blómutyssi fyri áleið 300,00 kr..
Meginreglan er, at kommunan ikki letur gávur í hesum sambandi. Grunda á, at føðingardagar eru privat viðurskifti, ið sum so ikki hevur nakað við arbeiðsplássið at gera.

**Frá fyri aldur**

| | |
|---|---|
| 10 -15 ár | blómutyssi og gávu fyri áleið 2.000,00 kr.. |
| 15-25 ár | blómutyssi og gávu fyri áleið 4.000,00 kr.. |
| 25 - ár | blómutyssi og gávu fyri áleið 5.000,00 kr.. |

Avvarðandi leiðari boðar býráðsumsitingini frá merkisdøgum.

Borgarar sum fylla 90 ár fáa sendandi blómutyssi frá Vágs kommunu fyri áleið 300,00 kr..
Í samb. við 100 ára føðingardagar hjá privatpersónum rindar kommunan fyri mat, høli og fólk til matger.

Nýggjur borgarar fáa sendandi lítla gávu saman við korti fyri áleið 100,00 kr..

**Rundan starvsdag**
Hvørt ár á jólaborðhaldið hjá Vágs kommunu, verða starvsfólk sum í árinum hava haft rundan starvsdag heiðraði. Borgarstjórin heldur røðu og handar gávu.

**Frá fyri aldur**

Skipa kann fyri móttøku á arbeiðsplássinum. Eri hølini á arbeiðsplássinum ikki hóskandi, kann móttøkan fara fram í øðrum hølum. Almenn móttøka verður fyriskipa um starvsfólkið ynskja/játta tað. Móttøkan kann skipast við ábitið/køku og drykkjuvørum. Útreiðslurnar av merkisdøgunum verða rindaðar av viðkomandi stovni/rakstrarstaði. Á móttøkuni heldur borgarstjórin røðu og handar gávuna.

**Persónligar merkisdagar**

**Endamál**
Endamálið er at stuðla starvsfólki í at kunna vera heima í.s.v. serstakar persónligar merkisdagar.

**Ábyrgd**
Tað er avvarðandi leiðari sum hevur ábyrgdina

**Reglur**
Starvsfólk kunnu fáa frí við løn á 50 og 60 ára føðingardegi, og tá tey giftast, umframt á silvur- og gullbrúdleypdegnum.

Hesar reglur eru galdandi fyri øll starvsfólk hjá Vágs kommunu.

Býráðsleiðslan/starvsfólkaleiðarin dagførir og umsitur reglugerðina og tilhoyrandi yvirlit yvir starvsfólkadagar.

Reglugerðin verður løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar og staðfestingar.